H71-Neistin 21-33 (11-13):

# Punkteraðir hoyvíkingar

**Við einum greiðum tapi fyri Neistanum komu annars høgtflúgvandi hoyvíkingar so dundrandi niður aftur á jørðina**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Síðani vetrarsteðgin hava hoyvikingar so avgjørt verið eitt av teimum liðum, sum hevur skapt sær sjálvum umtalu. Ein røð av góðum úrslitum hava flutt liðið úr botnstríðnum upp ímóti heiðursmerkjum, og leygardagin skuldu teir gera seg til at taka enn eitt fet á leiðini.

Mótstøðuliðið hesa ferð var Neistin, sum hinvegin hevur havt eitt vánaligt endaspæl, har liðið er dottið úr oddastríðnum og mest sum út um heiðursmerkjastríðið.

## Dovisligt

Grundað á hesa gongdina var kanska væntandi, at Hoyvíkingar enn einaferð skuldu trumla Neistan niður, soleiðis sum teir gjørdu í fyrra dystinum liðanna millum, men tað var tó so langt burturífrá.

Góða gongdin hjá hoyvíkingum hevur í stóran mun stava frá einari vælvirkandi verju, og so einum stríðsvilja, sum hevur verið væl størri enn hjá mótstøðuni, men hvørki av hesum var sjónligt leygardagin.

Fyrri hálvleikurin var allur sum hann var sera dovinsligur. Leikferðin var lág, og tó at hoyvíkingar fingu betri byrjanina, so eggjaði hetta teimum als ikki til at sveiggja seg nakað serliga upp. Heldur tvørturímóti, so lótu teir nú alt spælið yvir til Neistan, og tað var eisini skjótt, at teir bláu takkaðu fyri. Fyrst sendu teir seg framum við fimm málum á rað, og tó at hoyvíkingarnir vunnu seg upp á javnt undan steðginum, so lá tað í øllum førum í luftini, at skuldi hetta vera lagið, so fór sigursgongdin at steðga.

Og tað var eisini hampuliga skjótt, at Neistin setti alt upp á pláss seinna umfarið. Ferðin varð kanska ikki sett tað heilt stóra upp, men teir lukkaðu fyrst og fremst av í verjupartinum, og so kundu teir ferð eftir ferð fáa mál av tí meira lætta slagnum, tá kontraálopini vórðu send avstað.

Ikki minst hóvaði hetta Kára Mortensen, sum spelaða eftir vøllinum sum annar unglingi, og tá so neistavenjarin, sum aftur hevði funnið leikarabúnan fram, so eisini sendi tveir bóltar í kassan – tað seinni enttá sum flúgvari – so stóð dysturin ikki at bjarga.

## Gongdin kanska vend

Hóast talan var um ein dyst av teimum heilt linligu, so skerst ikki burtur, at hetta júst mundi vera tað, sum Neistin hevði tørv á. Mótburðurin, sum liðið hevur havt seinastu mánaðirnar hevur ført liðið í eina ónda ringrás, og kanska var tað júst hetta, sum skuldi til, soleiðis at liðið nú aftur kann hugsa positivt.

Fyri hoyvíkingar tykist tað hinvegin, sum var hetta endin á einum góðum tíðarskeiði hjá teimum. Eitt tíðarskeið, sum í stóran mun hevur verið bygt á samanhald og stríðsvilja, men hesir báðir partar tóktust vera fullkomuliga burtur leygardagin. Møguliga var talan bara um ein off-day av teimum heilt stóru, men um so er, so skal liðið av álvara prógva seg sjálvt, tá teir um eina viku spæla móti særdu vestmenningunum.

## Dysturin í tølum

**H71-Neistin 21-33 (11-13)**

Málskjúttar:
H71: Bárður Brimvík 7, Halgir Dahl Olesen 6(1), Hans Jákup Jacobsen 2, Annfinnur N. Debess 2, Johnny Durhuus 2, Niels Viggo Niclasen 1, Kristian Eli Zachariasen 1
Neistin: Áki Mørk 10(1), Kári Mortensen 6, Dann Thorleifsson 5, Morgan Knezevic 4, Helgi Justinussen 3, Jón Ludvig 2, Dia Midjord 2, Ræni Slættanes 1
Brotskøst: H71 1, Neistin 1
Útvísingar: H71 2, Neistin 3
Dómarar úr Kyndli: Eyðun Samuelsen & Hannis Wardum. Tann minni av teimum hevði føðingardag, og sum ferðin var á dystinum, kundi hann eisini loyva sær at hugsa meira um hetta enn dystin.

Dráttur-ÍF 0-3

# Nú er ÍF heilt nær við



*Tó at sigurin á Drátti ikki vissaði teimum meistaraheitið, so eru tær hjá ÍF nú so nær við, at tær hava í minsta lagi níggju fingrar á føroyameistarasteypinum*

*Mynd: Finnur Justinussen*

**Eftir sigurin á Drátti skal ÍF at kalla gera sær ómak, um tað skal eydnast teimum at missa gullið í seinasta umfarinum**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað eydnaðist ikki ÍF at ogna sær meistaraheitið, tá tær á næst seinata leikdegi vitjaðu á Giljanesi. Fortreytirnar fyri hesum vóru millum annað, at TB skuldi basa Mjølni á Tvøroyri, men tá tað ikki hendi, so vistu tær hjá ÍF, at enn máttu tær bíða eina viku.

Uppgávan hjá ÍF var ímóti Drátti, sum hevur argað onkun tíð fyrr í ár, men hesa ferð var tó eingin ivi. Vit fingu tíverri ikki fatur á sett-úrslitunum fyri dystin, men sum skilst, so var ongan tíð nakar ivi um, hvat av liðunum var hitt betra.

ÍF tørvar nú bert ein sigur í seinasta dystinum, til tess at tryggja sær meistaraheitið, og tó at tær áður hava ført fram, at einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt, so munnul sjálvt mest svartskygdastu fuglfirðingarnir nú ásanna, at gullið er um at vera heima.

Seinasti dysturin á árinum er nevnliga á heimavølli móti KÍF, sum er niðasta liðið í deildini, og har er so einki at ivast í, at ÍF eruy stórfavorittar – og gott og væl tað.

Tí er einki at ivast í, at alt skreytið verður funnið fram longu undan dystinum móti KÍF. ÍF hevur ongan tíð áður verið meistarar í kvinnudeildini, og at hetta hendir samstundis, sum menninir enn einaferð hava ognað sær gullið, ger á ongan hátt dagin í Fuglafirði minni.

Fleyr-Fram 0-3 (25-27, 13-25, 16-25):

# Fram eigur høvuðsstaðin

**Tað var bert í fyrsta settið, at Fleyr fekk givið grannunum líkinda mótstøðu**

MANSFLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fram er sterkasta liðið í høvuðsstaðnum. Tað er sum einastu orðini, sum føroyameistarrnir frá 2002 hava, nú flogbóltskappingin er um at vera av.

Og hetta staðfestu teir so enn einaferð fríggjadagin, tá framskundaði dysturin móti Fleyr var á skránni.

Tað var nú heldur ikki væntandi, at Fleyr fór at geva nakra mótstøðu sum so, men fyrsta settið var tó um reppið, at teir loyptu hvøkk á.

Fram raknaði tó við eftir hendan hvøkkin, og restina av dystinum var sum so einki a tosa um. Ein og teir so ofta hava upplivað tað í ár, vórðu teir hjá Fleyr spældir út av vøllinum, og so var tann grannauppgerðin liðug.

Fram hevur nú ein dyst eftir á skránni, tá teir í seinasta umfarinum taka ímóti nýggju meistarunum úr ÍF. Fyri plássini á stigatalvuni hevur dysturin ongan týdning, men tað er sum so ógvuliga hóskandi, at tað eru júst hesi liðini, sum enda árið. Hóast teir bert eru á fjórða plássinum, so hevur Fram kanska meira enn nakar annar megnað at argað ÍF í ár, og so kunnu teir í hesum seinasta dystinum enda árið við at fara í steypaskápið eftir sjónliga tekininum hjá fuglfirðingum um meistaraheitið.


# Kom og royn tann nýggja Citroën Berlingo!



**Citroën Berlingo 2.0HDI Multispace**

***184.000,-***

**Citroën Berlingo 1.6i Multispace**

***168.000,-***

- Hill yvir førara
- Rúm í dúrkinum aftan
- 2. skjótihurðar
- 624 litrar viðførisrúm
  - 2800 litrar um baksetrini verða løgd niður

*(1.4i og 1.9d fáast eisini)*
*Fleiri á goymslu*
*Fæst eisini sum vørubilur*

Sosialurin 311820

*Vælkomin til*

CITROËN
*Ivan Johansen Bilar*
*www.ivan.fo*



**Spæl teg klókan**



**Teknískt studentsprógv**

**Umsóknarfreist:**
**15. mars 2003**

http://tsk.fo
ring: 45 63 11



*til menn og kvinnur*

**Kostskeið** *á Húsarhaldsskúla Føroya*



**Vigar tú ov nógv! Broyt matvanarnar og liv heilsugott!**

**Skeiðið byrjar týsdagin 18. mars**

Undirvísarar:
Jóhanna á Tjaldrafløtti, føðslu og húsarhaldsfrøðingur
Elisabeth Akursmørk, økonoma

| Kl. | Týsdag | Mikudag | Hósdag |
|---|---|---|---|
| 09.30 - 11.00 | - | - ★ | - |
| 13.30 - 15.00 | - | - | - |
| 17.00 - 18.30 | - ★ | - | |

Kostnaður: 700 kr. fyri skeiðið - Gjaldast skal fyrsta dagin
Feittprosentið verður mált 3. hvørju viku
★ Serliga ætlað til tey, ið viga 30 kg ov nógv

VASTI 457171

HSF
**HÚSARHALDSSKÚLI FØROYA**
Stoksoyrarvegur 29, 700 Klaksvík, Tel. 456974, T-postur:hsf@post.olivant.fo